Uppskot um broyttar

# Valreglur fyri Eik Banka P/F

## § 1

Virkisøki Eik Banka P/F er lutað í hesi umboðsdømi: Suðurstreymoy, Norðstreymoy, Eysturoy, Norðoyggjar, Suðuroy, Sandoy og Vágoy.

Í umboðsdøminum Suðurstreymoy eru eisini Nólsoy, Hestur og Koltur, í umboðsdøminum Norðoyggjar eru Borðoy saman við Kalsoy, Kunoy, Viðoy, Svínoy og Fugloy, í umboðsdøminum Sandoy eru eisini Skúvoy og Dímun, og í umboðsdøminum Vágoy er eisini Mykines.

**Stk. 2** Í hvørjum umboðsdømi velja partaeigarar sínámillum eitt umboðsráð, sum í Suðurstreymoy hevur 15 limir, í Eysturoy 10 limir og í Norðoyggjum, Norðstreymoy, Suðuroy, Sandoy og Vágoy 6 limir í hvørjum umboðsdømi

**Stk. 3** Umboðsráðslimir eru um somu tíð sendiumboð á aðalfundum felagsins.

## § 2

Partaeigarar felagsins verða skrásettir sum hoyrandi til eitt av omanfyri nevndu umboðsdømum eftir egnum ynski.

Setir partaeigari ikki fram ynski um skráseting í ávísum umboðsdømi, verður viðkomandi skrásettur sum hoyrandi til umboðsdømið, ið hann sambært tí, til hvørja tíð í partabrævabók felagsins skrásetta bústaði, er heimahoyrandi í.

Er talan um partaeigara, ið hevur bústað uttan fyri umboðsdømini, og sum ikki skrivliga hevur sett ynski fram um skráseting í ávísum umboðsdømi, avger felagið, hvørjum umboðsdømi viðkomandi verður skrásettur í.

## § 3

Val til umboðsráð er fjórða hvørt ár í januarársfjórðinginum við gildi frá 1. apríl fyrstkomandi.

Tíðarskeiðið, nær valið skal verða, verður ásett av nevndini.

**Stk. 2** Partaeigararnir verða boðaðir til valfundar av nevndini minst 4 vikur áðrenn valið, við lýsing í bløðunum, við skrivligum boðum til partaeigarnar á seinasta skrásetta bústaði sambært partabrævabókini og við uppslagi í avgreiðsluhølunum.

**Stk. 3** Uppskot um valevni skulu skrivliga vera hjá Eik Banka í umboðsdøminum í seinasta lagi 3 vikur fyri valið. Seinast 1 viku fyri valið skal valevnislistin verða framlagdur í avgreiðsluni í umboðsdøminum.

## § 4

Valbæri til umboðsráð hava persónligir myndigir partaeigarar.

**Stk. 2** Tann, ið letur seg stilla upp, skal við undirskrift vátta, at tikið verður við vali.

**Stk. 3** Valstýrið sær til, at valevnini lúka treytirnar fyri valbæri. Í valstýrinum sita 3 limir, valdir av nevndini.

**Stk. 4** Tá val fer fram til umboðsráð, verður í hvørjum umboðsdømi gjørdur ein uppstillingarlisti við nøvnum, starvsheiti og bústaði á teimum, sum veljast kunnu og hava játtað at tikið við vali. Eru ikki, eftir at freistin fyri

at senda inn uppskot um valevni er umliðin, nóg mong valevni í uppskoti, skal nevndin seta neyðuga valevnatalið afturat á listan til tess at røkka kravda valevnatalið.

Stk. 5 Eru í einum umboðsdømi ikki fleiri valevni uppstillað, enn veljast skulu, eru hesi vald uttan atkvøðugreiðslu.

## § 5

Valrætt til umboðsráð hava teir partaeigarar, hvørs partabrøv eru skrásett upp á navn í partabrævabók felagsins tann 1. januar sama ár, ella sum hava fráboðað og prógvað síni rættindi til partabrøvini, tann 1. januar sama ár. Undantiknir eru partaeigarar, ið hava tilnevnt egnan umboðsráðslim, jb. §6, stk. 6 í viðtøkunum. Atkvøðurætturin til partabrøv hjá ómyndigum verður útintur av verjanum.

Hvørt partabræv gevur eina atkvøðu til umboðsráðsvalið, tó hevur hvør partaeigari í mesta lagi atkvøður svarandi til 5,0 prosent av samlaðu partabrøvunum.

**Stk. 2** Sambært reglugerð ásett av nevndini kann atkvøðast við brævatkvøðu. Atkvøðast kann ikki við fulltrú.

## § 6

Hvør, sum valrætt hevur, fær valkort, sum havast skal við, tá valt verður. Valið fer fram í avgreiðslum Eik Banka og á valfundi í umboðsdøminum.

**Stk. 2** Á atkvøðuseðlinum í umboðsdøminum skulu standa nøvnini á øllum valevnum í bókstavarøð, og hvussu atkvøðast kann.

**Stk. 3** Útflýggjað verður partaeigarum ein atkvøðuseðil við tilskilan av talinum á atkvøðum. Atkvøtt verður við at seta kross við navnið á tí valevni, sum veljarin vil hava valt. Krossur kann setast við í mesta lagi eitt valevni. Er krossur settur við meira enn eitt valevni, er atkvøðuseðilin ógildigur. Valevnið, ið veljarin hevur atkvøtt fyri, fær tað talið av atkvøðum, ið er tilskilað á atkvøðuseðlinum.

**Stk. 4** Atkvøðuseðilin er ógildur, um krossurin er óskilliga settur ella um á annan hátt er ógreitt, hvønn veljarin hevur viljað havt valdan.

**Stk. 5** Limirnir í umboðsráðnum verða valdir við lutfalsligum meiriluta, t.e. eftir, hvussu mangar atkvøður, teir hava fingið tilsamans, eftir at allar gildar atkvøður eru taldar. Tað valevnið, ið hevur fingið flestar atkvøður, er fyrst valt, tað, ið hevur næstflestar atkvøður, er valt sum annað o.sfr. Stendur á jøvnum, verður avgjørt við lutakasti, hvør valdur er.

## § 7

Valstýrið hevur ábyrgd av valuppgerðini undir eftirliti av aðalfundarvaldu grannskoðan Eik Banka.

## § 8

Um valið verður førd gerðabók, ið valstýrið og grannskoðarin, ið hevur eftirlitið, skriva undir. Partaeigarar fáa boð um úrslitið av valinum.

## § 9

Neyðugar broytingar í valreglunum verða gjørdar av aðalfundinum.

Valreglurnar fyri Eik Banka P/F, sum seinast broyttar á aðalfundi xx. xxxx 2009.

# Nevndin í Eik Banka P/F

Frithleif Olsen, formaður

Odd A. Bjellvåg, næstformaður

Gert Langgaard

Finnbogi Niclasen

Marian Jacobsen

Mathea Hilduberg

Fía Selma Nielsen

Tórmund A. Joensen

Rakul Dam

Rólant Vidtfeldt

Petur D. W. Hammer